

## Eg og tú á netinum

- Ver saman við barninum, tá ið tað fer á netið
- Lær barnið ikki at lata persónligar upplýsingar frá sær
- Far við, um barnið vil hitta onkran, sum tað hevur lært at kenna á netinum
- Lær barnið at vísa góðan atburð á netinum
- Legg filtur á telduna, sum forðar atgongdina til ávísar síður


## Hvar er húgvan nú???




**Navnastemplið er ein genial uppfinning, har tú skjótt og lætt kanst seta navn í ting og klæðir hjá barninum: bamsur, leikur, skógvar, jakkar, draktir... Vel sjálv tekst og skrift. Tolir vask við 90° og heldur umleið 60 vask við 30°. Navnastemplið er eisini vælegnað til fólk á sambýlum ella ellisheimum. Fæst til keyps á spildurnýggju heimasíðuni a www.fjas.fo, sum selur mangt og hvat til børn og barnafamiljur..**

*** Familjan Eikilund Tlf. 33 00 00 * Mia & Anton Tlf. 33 00 00**


## Vit kennast

Styrk relatiónirnar hjá barninum við hesum spælinum, har tit skulu gita fólk, sum tit kenna. Annar kemur við upplýsingum um persónin. Til dømis: Tann, sum eg hugsi um, býr í Klaksvík. Hann hevur myrkt hár og eigur tveir synir. Hvør er tað? So skal hin gita. Aftaná skiftast tit.



## Eg viiiil hava ...

Hvør kennir ikki til plágarí í handlum og úr ynskibløðum, sum koma við postinum? Í staðin fyri at siga kortanei, so lofta heldur ynskinum við at lurta og vísa barninum, at tú skilir og hoyrir tað. Til dømis: »Ja, tú kundi ordiliga væl hugsað tær hasa dukkuna. Tað skilji eg væl, tí hon er ordiliga fín og tú hevði verið so góð við hana. Kanska kundi tú ynskt tær hana í jólagávu?«



## Málslig menning

Les og fortel søgur hvønn dag. Legg eisini aldursvarandi bøkur og uppgávur fram. Fortel um tankar og hendingar, sum tú minnist. Eisini um familjuna og tað sum hendi fyrr í tíðini.